Endurskoðan apríl 2025
Frágreiðing ísb. við broytingaruppskot:
~~Reyður tekstur~~ > Strikað
Grønur tekstur > Nýggjur tekstur
Gult tekn **(Bláur tekstur)** > Grundgeving, viðmerking

Yvirlitskort: https://klaksvikar.kort.fo/alment/

****
* *
* *
* **ALMENN BYGGISAMTYKT** *
* **FYRI** *
* **KLAKSVÍKAR KOMMUNU** *
* *
* *
****

Nýggja forsíðu

I. KAPITTUL. UMSITINGARLIGAR FYRISKIPANIR.

1. gr. Byggivaldið.

1. Byggivaldið í Klaksvíkar Kommunu hevur býráðið við heimild í løgtingslóg nr.13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum. ~~(byggi- og býarskipanarnevnd býráðsins).~~

2. Byggifulltrúin hevur býráðsins vegna eftirlit við, at byggisamtyktirnar verða hildnar, og umsitur tær.

   Har, ið niðanfyri stendur: byggifulltrúin, er hetta heiti at skilja sum Tekniski Stjórin ella avvarðandi ~~hjálparmaður~~ hjálparfólk hjá Tekniska Stjóranum, ið røkir umsitingina.

2. gr. Økið, sum byggisamtyktin hevur gildi fyri.

1. Henda byggisamtykt hevur gildi fyri alla Klaksvíkar Kommunu.
   a) Bygging fevnir um nýbygging, umvæling, umbygging, afturatbygging og broyting í nýtslu av bygningum.
   b) Bygningar eru bæði bústaðarbygningar og aðrir bygningar, sum verða nýttir til vinnu, fyrisiting, tænastur til almenningin ella frítíðarítriv.
   c) Niðurtøka av bygging skal fráboðast kommunala byggivaldinum
   d) Bygningar við byggiloyvi, sum er útskrivað áðrenn lógin[1] kom í gildi, eru ikki fevndir av lógini. Hetta er tó ikki galdandi fyri umbygging, umvæling og broyting av nýtslu, um søkt verður um byggiloyvi eftir, at lógin kom í gildi
   e) Infrakervi so sum vega- kloakk- og frárenningararbeiði.
   f) Áseting av lendisnýtslu
   g) Annars verður víst til eina og hvørja tíð galdandi bygningskunngerð.

[1] *(Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022)*

~~Ásetingar í samtyktini galda fyri:~~ **(BK17)**

~~a. Nýggja Nýbygging.~~

~~b. Umbygging av/ella bygging afturat bygging sum er.~~

~~c. Broyting í innrætning ella nýtslu av bygging sum er, og sum hevði komið undir hesa samtykt, um hon var nýbygging.~~

~~d. Byggingar sum eru, tá ið tær einstøku reglurnar beinleiðis heimila hetta.~~

~~3. Til bygging verður roknað:~~ **(BK17)**

~~a. Fastar konstruktiónir og virki, sum eftir fyritreytunum í byggisamtyktini eru at skilja sum bygging.~~

~~b. Flytiligar konstruktiónir, eitt nú tjøld, bátar, vognar ella tílíkt, tá ið nýtsla teirra sum ikki bert er fyribils.~~

~~c. Tangar, kranar, flutningsbrýr, tunnlar, pallar og aðrar konstruktiónir í tann mun, sum býráðið (byggi- og býarskipanarnevndin) heldur vera náttúrligt, tá ið hugsað verður um almennan tryggleika, skil, heilsu og onnur viðurskifti sum byggisamtyktin er ætlað at røkja.~~

~~4. Byggingar, sum eru, mugu ikki við broyting, um- ella afturatbygging, hækkan ella á annan hátt verða broyttar, soleiðis at tær stríða ímóti galdandi reglum ella, um so skuldi verið, fara at stríða enn meira ímóti hesum reglum, enn tær longu gera.~~ **(BK17)**

~~5. Skulu byggingar, sum eru, verða umvældar ella broyttar so nógv, at øll byggingin verður endurnýggjað (høvuðsumbygging), skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at byggingin sum mest samsvarar við tær reglur, ið galda fyri nýbygging. Býráðið (byggi- og býarskipanarnevndin ella avvarandi nevnd býráðsins- ger av, hvat ið skal verða mett at vera høvuðsumbygging.~~ **(BK17)**

~~6. Nýbygging, broytingar, um- ella afturatbyggingar og høvðusumbyggingar skulu, umframt at lúka treytirnar í hesi byggisamtykt, eisini vera í samsvari við møguligar býarskipanir, serstakar byggisamtyktir, sertreytir, , og lógir aðramáta~~ **(BK17)**

3. gr. Byggifulltrúin

1. Allar útstykkingar- og byggiumsóknir verða sendar býráðnum, sum síðani beinir tær til byggifulltrúan.

~~Byggifulltrúin:~~ **(óneyðgut)**

a. Skal leggja málið fyri býráðið ella avvarandi nevnd býráðsins, tá ið umsóknin ikki beinleiðis kann verða játtað sambært byggisamtyktini, ella málið er víttfevnt ella hevur grundregluligan týdning, við innstilling um hvussu málið kann verða loyst ella um hetta skal noktast frama. Aftan á at málið er viðgjørt í avvarðandi nevnd ~~byggi- og býarskipanarnevndini~~, skal byggifulltrúin siga umsøkjaranum frá avgerð nevndarinnar (sí tó 3. gr. 6. stk.). (Obs tilvísing)

b. Kann jatta umsóknini, tá ið hon er innan fyri reglurnar í galdandi byggisamtykt og málið í aðramáta ikki er víðfevnt ella hevur grundregluligan týdning (sí a.). Tó skal málið altíð verða lagt fyri avvarðandi nevnd til kunningar**.**

2. Er í einum máli talan um nýgerð ella umlegging av vegum, bryggjum, vatn-, kloakk-, ella øðrum tekniskum leiðingum, skal ummæli fáast frá Tekniska Stjóranum ella ~~honum~~

starvsfólki, sum Tekniski Stjórin hevur latið málsøkið at røkja, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

~~3. Í málum viðvíkjandi bygging av niðanfyri nevnda slag, skal álit frá byggifulltrúanum vera til skjals hjá avvarandi nevnd , áðrenn byggiloyvi verður givið.~~

~~a. Hús eins og størri rúm til ídnaðar- og goymslu , verkstaðar- ella handilsvirki.~~

~~b. Kirkjur, leikhús, gistingarhús, sjúkrahús, hús ætlað til undirvísingar, framsýningar ella til stuttleika, og yvirhøvur hús ella størri høli, har nógv fólk koma saman.~~

~~4. Byggifulltrúi kann krevja at fáa allar neyðugur upplýsingar fyri at kunna gera eina fulltakandi meting av einari byggiætlan, sum tað hevur fingið til viðgerðar, haruppií - har umstøðurnar tala fyri tí - eina heildarbyggiætlan fyri avvarðandi virki ella ogn.~~ **(BK17)**

5. Álit frá Teknisku Umsiting skal vera til skjals, áðrenn býráðið (avvarðandi nevnd) tekur avgerð um broytingar ella uppískoyti til hesa byggisamtykt, broytingar í fastsettum byggiøkjum, nýtsla av nýggjum tilfari ella konstruktiónum ella yvirhøvur í málum har avgerðin er hildin at hava serligan ella principiellan týdning.

6. Er talan um smærri frávik ella mál, sum ikki hava prinsipiellan týdning, tekur nevndin avgerð.
Um so er, at ein ella fleiri av limunum í nevndini krevja tað, skal málið leggjast fram fyri býráðið til endaliga avgerð.

4. gr. Byggiumsóknir.

1. ~~Farið kann ikki verða undir arbeiði, ið kemur undir reglurnar í byggisamtyktini sbr., lógtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum uttan skrivligt loyvi frá byggifulltrúanum.~~ **(BK17)**
Víst verður til eina og hvørja tíð galdandi bygningskunngerð. (Kap. 1 fyrisitingarligar ásetingar BK17).

~~2. Allar umsóknir - haruppií umsóknir um loyvi til at grava fyri grund, til møguligar spreingingar, broytingar innan ella uttan, eitt nú at flyta ella bróta ígjøgnum múr (vegg) ella skilarúm, seta upp eldstaðir, taka niður ella flyta hús, vega , kloakk- og frárenningararbeiði - skulu verða sendar býráðnum, sum síðan beinir tær til Teknisku Umsiting til viðgerðar.~~ **(BK17)**

~~3. Byggiumsókn skal vera skrivlig, og hjálagdar henni skulu vera tær tekningar og aðrar upplýsingar, ið neyðugar eru til greitt at skilja málið og til holla avgerð av tí umsøkta.~~ **(BK17)**

4. Tann, sum sendir umsókn inn, hevur ábyrgd av, at tey gjøld, ið rindast skulu sambært 11. gr. verða goldin. (Obs. um gr. 11 passar inn í nýggja útgávu)

~~5. Skrivlig loyvi til smærri byggiarbeiði kunnu verða givin av starvsfólki, sum byggivaldið hevur givið umboð til tess.~~ **(BK17)**

~~6. Tekningar og útrokningar skulu verða gjørdar av fólki, sum eru før til tess, av byggifrøðingum, verkfrøðingum, teknikarum ella øðrum, sum byggivaldið heldur hava nóg góðan kunnleika til tess, og um tekningar og útrokningar teirra lúka tey krøv ið vanliga verða sett til tekniska projektering.~~ **(BK17)**

~~7. Allar tekningar, planir, frágreiðingar, útrokningar o.t. fylgiskjøl hjá byggiumsókn, skulu verða dagfest, hava matr.nr. á ognini, og hann, ið uppsett hesi skjøl hevur, skal skriva undir í høgra horni. Hesin hevur ábyrgd av, at tey eru fullgóð.~~ **(BK17)**

~~8. Sum fylgiskjøl við umsóknini um húsabygging skulu verða hjáløgd:~~
~~Frágreiðingar, sum saman við tekningum gevur fullfíggjaða og greiða lýsing av teirri ætlaðu bygging.~~ **(BK17)**

~~a. Støðuplanur, ikki minni enn 1:1000, sum vísir støðd og skapilsi á byggigrundini, hvussu hon vendir, móti gøtum og ættum, hvar og hvussu ætlað hús skulu standa, og ætlaða vatnburturveiting.~~

~~Støðuplanur skal soleiðis geva upplýsingar um verandi og framtíðar hæddarstig á grundini, og um tað verður hildið neyðugt fyri at avgreiða málið, hæddarstigini á grannagrundunum.~~

~~b. Flatmyndir og tekningar av øllum útsíðum av húsunum í málið í minsta lagi 1:100 við áskrivaðum málum, bæði høvuðsmálum og gjøgnumgangandi stakmálum. Skilast skal til, hvat rúmini eru ætlað til. Berandi konstruktiónir skulu vera teknaðar og sperrurnar vístar, eisini skulu dyr, saniterar innleggingar o.a. verða teknaðar.~~

~~c. Tvørskurðir í minsta lagi1:50, við neyðugum sermyndum í minsta lagi 1:20 sum neyðugir eru fyri at fáa eina fatan av húsunum.~~

~~d. Frágreiðingar, sum saman við tekningum gevur fullfíggjaða og greiða lýsing av teirra ætlaðu bygging.~~

~~9. Byggifulltrúin kann skipa fyri, at stakprojekteringar saman við útrokningunum skulu vera til taks og innsendar til góðkenningar, áðrenn bygging verður byrjað.~~ **(BK17)**

~~10. Umsøknir við tekningum, frágreiðingum og útrokningum - her uppi í ein útrokning av byggingarstiginum - og onnur fylgiskjøl skulu verða innsendar í tveimum eintøkum og skulu hava allar upplýsingar, sum neyðugar eru fyri greitt at skilja málið og til holla avgerð av tí umsøkta.~~ **(BK17)**

~~Frávik frá lógum, samtyktum, sertreytum (servituttum) øðrum fyrisetanum - her uppi í møguligar býarskipanir - skulu greiniliga verða tilskilað, og samstundis skal verða upplýst um loyvi til frávik er fingið. Slík frávik eru bert roknað fyri játtað, tá tey hava verið nevnd í umsóknini, og tilskilað er í byggiloyvinum, at tað neyðuga loyvið ella undantaksloyvið er givið, sí 5. gr. 3. stk.~~ **(BK17)**

5. gr. Byggiloyvi og byggiváttan.

1. Byggiloyvi skal vera skrivligt. Áðrenn byggiloyvi kann verða útskrivað, skal vera sannað at reglurnar í *kunngerð nr. 57 frá 27.apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð* verða fylgdar. ~~Eitt makaskjal av byggiloyvinum skal verða goymt á skjalasavni býráðsins.~~ **(Broytt mannagongd - Digitalt)**

~~2. Byggiloyvi kann verða bundið av treytum, sum verða hildnar neyðugar, tá ið hugsað verður um dálking, umhvørvi, um útsjónd og konstruktión, heruppií tilkoyring, bilstøðlar og tún, og av heildarbyggiætlan fyri økið, talan er um. Byggiloyvið kann somuleiðis verða givið treytað av trygdartiltøkum (eitt nú girðing, skorðum, skjóltekjum o.ø.).~~ **(BK17)**

~~3. Um so er, at í byggiloyvinum er tilskilað krøv um, at ásetingar, ið ikki standa í byggisamtyktini, skulu verða loknar, skulu slík krøv verða tilskilað saman við upplýsing um heimildina fyri teimum, og um so er, at krøvini eru sett av øðrum mynduleika enn byggivaldinum, upplýsing um hetta og um, hvar ein kæra um hesi krøv kann verða send - og møguliga innanfyri hvørja freist.~~ **(BK17)**

~~4. Byggiloyvi hevur gildi í eitt ár, frá tí degi, tað er játtað. Um bygging ikki er byrjað innan tað tíð, skal nýtt byggiloyvi verða fingið.~~ **(BK17)**

5. Byggifulltrúin skal verða fráboðaður áðrenn farið verður undir bygging

~~6. Verður byrjað bygging steðgað í 6 mánaðar ella longur, skal verða boðað byggifulltrúanum frá, áðrenn aftur verður byrjað. Verður steðgurin longur enn eitt ár, skal nýtt byggiloyvi verða fingið.~~ **(BK17)**

~~7. Tá ið bygging er liðug, skal verða boðað byggifulltrúanum frá, og váttan hansara t.e. byggiváttanin - fáast um, at byggingin, í tann mun staðfesting hevur verið gjørlig, er gjørd í samsvari við byggisamtyktina og tær serstøku treytirnar, í settar vóru, tá ið byggiloyvið varð givið. Ein fingin byggiváttan forðar ikki byggivaldinum í at kunna krevja, at frávik, ið seinri verða funnin verða rættað (sí 8. gr. 4. 5. stk.).~~ **(BK17)**

~~8. Áðrenn byggiváttan verður givin, ansar byggifulltrúin eftir, at Tekniski Stjórin hevur góðkent, at frárenning, kloakk og vegir eru í lagi.~~ **(BK17)**

~~9. Byggifulltrúin kann í serstøkum førum geva fyribils byggiváttan til byggiarbeiði, ið ikki er endaliga lokið í samsvari við byggiloyvið. Fyribils byggiváttanin skal hava áskrift um, hvat ið skortar húsunum samanborið við byggiloyvið. Har hesin skortur hevur við sær, at byggingin er ólóglig samsvarandi galdandi reglum, skal húsaeigarin skrivliga svara fyri, at viðurskiftini skulu koma í rættlag innan ásetta freist og samtykkja í, at byggivaldið annars letur tey vantandi arbeiði gera fyri hansara rokning. Byggivaldið kann krevja, at bankaábyrgd ella onnur trygd er veitt til tílík arbeiði, tá ið fyribils byggiváttan verður givin.~~ **(BK17)**

~~6. gr. Umsiting og niðurtøka av bygging.~~ **(BK17)**

~~1. Hvør bygging skal í øllum lutum við øllum, sum til hoyrir, altíð verða hildin í fullgóðum og vandaligum standi. Er umsiting av bygging stak vánalig, kann byggivaldið áleggja avvarðandi at bøta um brekini og um neyðugt lata tey gera fyri rokning eigarans.~~

~~2. Verður hildið, at vandi hóttir tey, sum búgva í húsunum, ella onnur, kann byggivaldið krevja, at húsini verða byrgd og møguliga, at flutt verður úr teimum ella øðrum húsum.~~

~~3. Bygging má ikki verða tikin niður, uttan so at loyvi er fingið frá byggivaldinum. Í umsókn um slíkt loyvi, skal verða skilað til umleið hvussu hædd og flatamál á byggingini eru. Undantak frá hesi áseting er t.d. niðurtøka av úthúsum, skúrum og tílíkum smáum byggingum.~~

~~4. Niðurtøku- og byggiarbeiði skulu fara fram á tryggan hátt og samsvarandi teimum fyriskipanum, sum býráðið í tí einstaka førinum gevur, so eisini tá ið tað ræður um at beina burtur ella hylja undirstøður o.a. á vegøkinum.~~

~~5. Hevur bygningurin innleggingar til frárenningar, vatn, ravmagn, telefon ella tílíkt, er ikki loyvt at fara undir arbeiði, fyrr enn avvarðandi mynduleiki ella felag hevur fingið boð um hetta~~.

7. gr. Trygdartiltøk, meðan bygt verður.

1. Tá ið grivið ella sprongt verður fyri grund, skal tann, ið byggir, taka til øll neyðug trygdarráð til at verja fyri vanda ella skaða.

~~2. Hevur múrur ella onnur bygging skotist ímóti markaskilinum móti annars mans ogn, at hesin hevur ampa av tí, so er byggivaldinum heimilt at geva fyriskipan til tess at gera tey trygdartiltøk, ið neyðug eru í hesum føri.~~ **(BK17)**

~~3. Verður hildið neyðugt, meðan byggiarbeiði fer fram, heruppí neyðturvilig umvæling ella umsiting, bráfeingis at loyva atgongd inn á annars mans grund ella at seta skorður, stiga, smíðipallar, skjóltak ella tílíkt á henni ella inn yvir hana ella á hús á henni, er byggivaldinum heimilað við hóskandi fyrivarningi og í tann mun, neyðugt er, at geva loyvi at ráða yvir annars mans ogn.~~ **(BK17)**

~~Meðan loyvið frá byggivaldinum verður nýtt, má hetta vera til minst møguligan ampa fyri eigaran ella brúkaran av grannaognini. Ognin skal, tá ið tílík nýtsla heldur uppat, sum skjótast verða sett í sama stand sum áður.~~ **(BK17)**

~~8. gr. Brot á fyriskipanirnar í byggisamtyktini, atgonguheimild og trygging av ásetingunum.~~ **(BK17)**

~~1. Sektaður verður:~~

~~a. Hann, sum uttan fyrisett loyvi ávirkar nakað arbeiði, sum kemur undir fyriskipanirnar í byggisamtykt.~~
~~b. Hann, sum letur vera at geva byggifulltrúanum boð, sum fyrisett er.~~
~~c. Hann, sum fer at nýta bygging uttan fyrisetta váttan ella fyribilsloyvi.~~
~~d. Hann, sum tálmar eftirkanning, ið er heimilað í lóg.~~
~~e. Hann, sum ikki ger eftir lógliga frásøgdum boðum.~~
~~f. Hann, sum letur vera við at gera tey umsitingararbeiði, sum byggivaldið hevur álagt, og sum eru neyðug til tess at sleppa undan, at vandi stends av fyri tey, sum búgva í húsunum ella onnur.~~
~~g. Hann, sum brýtur fyriskipanirnar í hesi almennu byggisamtykt og aðrar serligar fyriskipanir, sum landsstýrið hevur góðkent, uttan at brotið kann verða talt undir reglurnar a-f.~~

~~2. Tá ið revsingin verður ásett, skal verða havdur í huga tann fíggjarvinningur, ið fingin er ella var ætlaður at verða fingin av ólógliga gjørdum arbeiði.~~

~~3. Rættarábyrgd fyri ólógliga bygging hevur hann, ið staðið hevur fyri arbeiðinum, ella hann, ið gjørt tað hevur, eftir umstøðum báðir. Hann, sum hevur latið arbeiðið gera, verður bert gjørdur ábyrgur, tá ið hann ikki veit at siga nakran annan, sum kann verða kravdur at hava rættarábyrgd, ella tá ið hann hevur verið við í brotinum og hevur vitað ella grunað um tann ólógliga atburðin. Rættarábyrgdin kann tá eftir umstøðum falla burtur mótvegis teimum, sum nevndir eru í fyrsta setningi.~~

~~4. Tað er skylda hansara, sum eigur eina ogn, at rætta tað sum er ólógligt á henni.~~

~~5. Ger eigarin ikki eftir boðum, hann hevur fingið, kann við dómi verða álagt honum, at rætta viðurskiftini, áðrenn ásett tíð er umliðin, og noyddur av nóg stórari framhaldandi bót.~~

~~6. Snýr brotið seg um nýtslu av ognini, og eigarin hevur givið nýtaranum tey neyðugu boðini um skyldurnar, hevur nýtarin ábyrgdina.~~

~~7. Verður farið undir arbeiði, sum kemur undir ásetingarnar í byggisamtykt uttan at fyrisett loyvi er fingið, kann byggivaldið krevja, at løgreglan beinanvegin setur bann fyri, at hildið verður fram við hesum arbeiði.~~

~~2. Tá ið ikki verður gjørt eftir skyldu, sum er áløgd við dómi, til at rætta ólóglig viðurskifti, áðrenn ásetta tíðarfreistin er umliðin, og tá ið innheinting av sektum, sum dømdar eru sambært 1. stk., ikki verður hildin at fáa tað ætlaða úrslit, kann byggivaldið krevja hjálp frá lógregluni til at fáa atgongd til at gera tað, sum byggivaldið heldur neyðugt vera til at gera viðurskiftini lóglig, møguliga til niðurtøku.~~

~~9. Ongum er heimilað at nokta starvsfólki byggivaldsins ella umboðsmanni tess atgongd, tá ið teir, við fullgóðum heimildarprógvi, koma til eina ogn at kanna eftir, um og í hvønn mun ein bygging er í samsvari við galdandi lóg, og um ásetingarnar í reglugerðini eru hildnar.~~

~~10. Reglur, reglugerðir, skipanir og ásetingar gjørdar sambært hesari samtykt, ella ásetingar bundnar at tí einstaka byggiloyvinum skulu vera at rokna fyri partar av byggisamtyktini og hava somu vernd sum hon.~~

~~9. gr. Undantaksloyvi.~~ (BK17)

~~1. Tá ið umráðandi grundir mæla til tess, ella har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi , og tá ið byggifulltrúin hevur viðmælt umsóknini, kann byggivaldið eftir umstøðum og gjøllari settum treytum loyva, at vikið verður frá ásetingunum í hesi byggisamtykt.~~

~~2. Áðrenn undantaksloyvi verður givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur, frá tí teir hava fingið boðini..~~

~~10. gr. Kæra.~~ (BK17)

~~Víst verður til Kærustovnin. Nærri frágreiðing.~~

~~1. Avgerðir kommununnar sambært hesari almennu byggisamtykt og teimum serstøku byggisamtyktunum er loyvt at skjóta til landstýrið~~
~~2. Tá ið annað ikki er fyrisett, er kærufreistin 30 dagar frá tí degi, avvarðandi fekk avgerðina at vita og upplýsing um hesa freist og um hvat vald kært kann verða til. Fyri avgerðir, sum alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.~~

~~3. Kæra um boð, sum byggivaldið hevur givið, sleppur einum ikki frá at gera eftir teimum; tó er kæruvaldinum heimilað at áseta, um kæra skal leingja um freistina.~~

~~4. Sakarmál til tess at royna avgerðir, sum landstýrið hevur tikið samsvarandi teirri almennu byggisamtyktini og teimum serstøku byggisamtyktunum, skal verða reist, áðrenn 6 vikur eru farnar frá tí degi, tá ið avgerðin er fráboðað viðkomandi. Viðvíkjandi avgerðum, sum eru alment kunngjørdar, verður freistin roknað frá kunngerðardegnum.~~

11. gr. Reglur um gjøld.

Gjald fyri ~~byggiváttan~~ byggimálsviðgerð.

1. Fyri viðgerð av umsókn um nýggja bygging, umbygging ella bygging aftur at húsum, sum eru, heruppií gerð ella broyting av frárenning, og fyri góðkenning av, at tað gjørda arbeiðið

er í samsvari við byggisamtyktina, verður svarað avgjald fyri hvønn m^2 av gólvvídd í húsahæddunum í umnevndu húsum ella húsapørtum.

Byggivaldið ásetur hetta avgjald eina ferð á hvørjum ári.

2. Víddin verður útroknað eftir reglunum í byggisamtyktini.
3. Gjaldskyldu hava bara byggingar og rúm, ið verða roknað til ábyggingarstigið á avvarðandi ogn.

II. KAPITTUL. FRÁRENNING ~~OG VATNVEITING.~~

1. gr. Frárenning:

1. Tá ið byggivaldið einki annað hevur góðkent, skal hvør nýggj bygging hava fullgóða frárenning bæði til skitið vatn og til regn-, omanávatn og grundvatn.

2. Byggivaldinum er heimilað, nær tað so er, at krevja framd tey neyðugu tiltøk, ið nevnd eru í byggiloyvinum. Ger hetta tað neyðugt, at frárenning verður løgd um annanmans grund, skal húsaeigarin vissa sær, at tær neyðugu avtalur um hetta verða tinglisnar á avvarðandi ognir.

~~3. Tá ið undirstøði verða gjørd tætt hjá ella yvir leiðingum, sum liggja frammanundan, skulu hesar verða vardar, og atgongd til reinsingar, møguliga til at leggja tær berar, skal verða tryggjað á slíkan hátt, sum byggivaldið góðkennir.~~ **(BK17)**

~~4. Tá ið kanningar, heruppí at leggja leiðingar berar og tílíkt, ætlast neyðugar til tess at finna orsøkina til brek á frárenningini á eini ogn, kann byggivaldið lata gera tey arbeiði, sum neyðug eru, bæði á avvarðandi ogn og á grannaognunum. Verða tá funnin løstir ella brek, ið heilt ella lutvíst ætlast at vera atvoldin í ólaginum, skal eigarin av hesi somu ogn endurgjald byggivaldinum eftir rokning tær útreiðslur, sum standast av teimum gjørdu kanningum og arbeiðum.~~ **(BK17)**

~~5. Gerð og nýtsla av frárenningum frá ognum við tí frárenningarútbúnaði, sum hartil hoyrir, skulu lúka tær fyriskipanir og treytir, sum byggivaldið setir~~ **(BK17)**

~~6. Ein kloakk má ikki verða nýtt á annan hátt, enn ætlað var við henni, tá ið hon varð gjørd, sum til dømis at veita í hana skaðiligt evni ella løgir.~~ **(BK17)**

~~7. Reglurnar í 4., 5. og 6. stk. hava eisini gildi fyri frárenningar, sum eru frammanundan.~~ **(BK17)**

~~2. gr. Broytingar í frárenningum, sum eru.~~ (BK17)

~~1. Kravt kann verða, at frárenningar og frárenningarútbúnaður, sum eru frammanundan, innan fyri tíðarfreist, sum byggivaldið avger og tilskilar, verða fingin at samsvara við fyriskipanirnar í 1. gr. í hesum kapitli.~~

~~2. Hesar ásetingar omanfyri skerja ikki rættin hjá byggivaldinum at krevja verðandi frárenning broytta av heilsu/umhvørvisgrundum.~~

~~3. gr. Vatnveiting.~~ (BK17)

~~1. Byggivaldið skal ansa eftir, áðrenn farið verður undir nýggja bygging, at hon hevur trygga og nóg góða veiting av drekkingarvatni, sum skal samsvara við alment galdandi reglur.~~

~~2. Annars skal altíð vera nóg góð atgongd til vatn til eldsløkkingar.~~

~~III. KAPITTUL. ÓBYGDU ØKINI.~~

~~1. gr. Tilhaldspláss.~~ (BK17)

~~1. Í bústaðaøkjum skal, tá ið annað ikki er vorðið góðkent av byggivaldinum, verða eitt nóg stórt og opið øki fingið til vegar eittans ætlað sum tilhalds- og spælipláss hjá børnum. Sostatt skal verða gjørt:~~ (BK17)

~~Spælipláss til smábørn upp á 200 m² fyri hvørjar 20 bústaðir.~~ (BK17)

~~Spælipláss upp á 2.000 m² fyri hvørjar 200 bústaðir.~~ (BK17)

~~2. Við bygging, sum heilt ella fyri ein part verða gjørd til vinnulig endamál, skal, tá ið byggivaldið ikki góðkennir annað, verða gjørd serligt tilhaldspláss úti til teirra, sum arbeiða í fyritøkuni. Byggivaldið kann í hvørjum einstøkum føri gera av, um stødd tilhaldsplássana er hóskandi.~~ (BK17)

~~3. Byggivaldið kann geva fyribils lættar viðvíkjandi hesum reglum í eldri býarpørtum, til tess hóskandi loysn er fingin fyri eitt størri øki.~~ (BK17)

~~2. gr. Gerð og umsiting av tilhaldsplássum.~~ **(BK17)**

~~1. Óbygd øki, sum eru løgd av og góðkend sum tilhaldspláss o.s.fr., er ikki loyvt at nýta til annað endamál, enn tað tey vóru avløgd til.~~

~~2. Tilhaldspláss, spælipláss og øki, sum eru ætlað til ferðslu hjá teimum, ið nýta byggingina ella øðrum, skulu verða hildin í góðum standi, so tey vandaleyst fáa verið nýtt til tað, tey eru ætlað. Byggivaldið kann seta neyðug umsitingararbeiði í verk fyri rokning eigarans. (sí annars 1. kapittul 8. gr. 5. og 7. stk.).~~

3. gr. Øki til bilstøðlar.

1. Í verandi ~~eldri~~ tættbygdum økjum skal bera til at seta aðrar treytir til parkering, um so er at ikki ber til at útvega øll tey ásettu parkeringsplássini.

~~1. Nóg stórt øki skal verða lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvarnir og tey, sum starvast í húsunum og vitjandi, viðskiftafólk útvegamenn o.o. fáa sett motorakfør síni frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.~~ **(BK17)**

~~2. Fyri hús, sum heilt ella fyri ein part verða nýtt til bústað, galda um annað ikki verður kravt ella góðkent av byggivaldinum, hesi minstukrøv til tess at ganga tørvinum á bilastøðlum á møti:~~ **(BK17)**

~~a. Við einhúskishús, ketu- og raðhús skal pláss verða gjørt til bilstøðlar til í minsta lagi 2 bilar hjá hvørjum bústaði.~~

~~b. Við íbúðarhús (eigaraíbúðir) skal tað økið, ið verður lagt av til bilstøðlar, verða í minsta lagi so stórt, at tað er pláss fyri 1 1/2 bili til hvønn bústað sær.~~ **(BK17)**

~~3. Fyri hús, sum heilt ella lutvíst verða nýtt til vinnu skal støðlaøki til vinnulig endamál í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldinum, soleiðis at farið verður eftir hvat vinnan er, talið á starvsfólki og tørvi hjá viðskiftafólki at seta bilar frá sær og tílíkt. Tó skal í minsta lagi verða pláss til ein bil fyri hvørjar 40 m² bruttohæddarvídd í húsunum.~~ **(BK17)**

~~4. Bilstøðlarnir skulu verða gjørdir, samstundis sum bygt verður, uttan so byggivaldið víkur frá hesum kravi.~~ **(BK17)**

~~5. Frávik frá omanfyristandandi ásetingum kunnu verða loyvd, um so er, at neyvari reglur eru fyrisettar í skipan gjørd av býráðnum.~~ **(BK17)**

~~4. gr. Atgongd frá vegi til óbygd øki.~~ **(BK17)**

~~1. Tann fyriskipaða atgongd frá vegi til óbygt øki, skal altíð vera nóg væl upplýst og farandi eftir, og má ikki verða gjørd nýtsla av henni á nakran hátt sum til dømis til bilstøðil, goymslu ella tílíkt, sum er ímóti tí, sum hon var ætlað til.~~

~~2. Bjargingaramboðini hjá sløkkiliðinum skulu altíð ótálmað sleppa inn á grundina.~~

IV. KAPITTUL. BYGGIFYRISKIPANDI ÁSETINGAR.

1. gr. ~~Orðaskiljingar.~~ Útrokning av ~~nýtingarstigum~~ byggingarstigum ~~o.a.m.~~

1. Størsta loyviliga byggingarvídd verður ásett fyri hvørja einstaka grund sum eitt lutfall millum grundvíddina á húsunum og víddina á grundøkinum. Talið, ið soleiðis kemur út, merkir byggingarstigið.

~~2. Bilskúr, úthús og hjallar verða bert roknað upp í sum ábygging við tí parti av tí samlaðu víddini á hesum bygningum, ið fer upp um 35 m^2.~~ **(BK17)**

2. gr. Byggingarhædd og fráleikar

Sambært ásetingum innan tey ymisku økini – sí økisásetingar fyri Klaksvíkar Kommunu

~~1. Eingi hús ella partar av húsum mugu fáa størri hædd, enn at ljósviðurskiftini verða nóg góð og hóskandi samsvar verður bæði millum húsini á somu grund og á teimum næstu grundunum; heldur ikki mugu tey fáa størri hædd enn ráðiligt er fyri sløkking av eldi.~~ **(BK17)**

~~2. Fráleikin bilskúr, úthús o.t. bygningar sínámillum og sum hoyra bústaðinum til, somuleiðis fráleikin millum hesar smærri bygningar og sethúsini kann verða minkaður niður í 1 m. Út fyri vindeygu til búrúm og køk skal fráleikin tó í minsta lagi vera 2,5 m.~~ **(BK17)**

3. Øll bygging skal vera minst 2,5 m frá grannamarki.

4. Bilskúr, onnur skúr, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:

   a. Longdin á bygging móti grannamarki má ikki vera størri enn 8 m. Vendir byggingin móti 2 markum, , má samlaða longdin ikki vera longri enn 12 m

b. Byggingin má ikki í einum fráleika upp til 2,5 m frá grannamarki vera hægri enn 2,5 m. (Har bygt verður niðanfyri veg verður hæddin máld frá veghædd framman fyri bilskúri)

c. Takvatn skal verða hildið á egnari grund.

~~5. Undantøk frá ásetingunum í., 4., 8. og 9. stk. kunnu verða loyvd, tá ið bygt verður samsvarandi góðkendari ætlan ella samsvarandi serstakari byggisamtykt.~~ **(BK17)**

~~6. Byggivaldið kann loyva, at eldverjukambar, skorsteinar og kvistar verða gjørdir oman fyri løgligt byggiprofil.~~ **(BK17)**

~~7. Byggivaldið kann annars loyva, at smærri vanlig húsaframskot eitt nú húsaundirstøði, trappur, svalur o.t. verða sett út um byggi- og veglinjur.~~ **(BK17)**

~~8. Landsvegamyndugleikin ásetir minsta byggifráleikan frá landsvegi.~~ **(BK17)**

V. KAPITTUL. VEGIR.

1. gr. ~~Orðaskiljingar.~~ Greiningar av vegi

1. Sum vegur er at skilja hvørt eitt øki, sum er lagt av ella gjørt til veg, har uppi í gøta, gonguvegur og pláss.

2. Økið ~~verður~~ verða roknað fyri ~~at vera lagt av~~ avløgd til veg tá ið:

   a. Almenningurin ella fleiri enn ein luteigari hava rætt til ferðslu á økinum.
   b. Økið við býarskipan, tinglýsing, hevd ella matrikli er tryggjað til framtíðar nýtslu sum vegur.

3. Øki verður roknað at vera gjørdur vegur, tá ið:

   ~~a. Økið verður nýtt til ferðslu av almenningi ella luteigarum, sum hava rætt til tess.~~
   ~~b. Økið er greitt til ferðslu við merking ella á annan sjónligan hátt til endamálið.~~
   (Greiðari orðing)

   a) Almenningur ella lutaeigarar, sum hava rætt til tess, nýta øki til ferðslu.
   b) Øki er greitt til ferðslu við merking ella á annan sjónligan hátt.

4. Miðlinja á vegi verður tilskilað av ~~Teknisku Umsitingini hjá~~ kommununi.

2. gr. Um at leggja av til og gera vegir.

~~1. Umframt tey niðanfyri nevndu øki, ið verða løgd av til vegir, skal hóskandi øki verða lagt av til vegskráar o.a.~~ **(Greiðari orðing)**

1. Tvør- og longdarskurður av vegum skal gerast sambært galdandi donskum og/ella norskum normum. Grundarligi fyri áseting av breidd (dimensionering) verður ásett av Klaksvíkar kommunu.

   a. Vegir, ið hava ella fara at fáa týdning fyri gjøgnumferðslu, somuleiðis vegir, ið binda tveir býarpartar saman, verða avlagdir í minst 11,0 m breidd, av hesum til akbreytir 7,0 m.

   b. Vegir í einum býarparti ella bygd verða avlagdir í minst 10,0 m breidd, av hesum til akbreytir 6,0 m. Byggivaldið kann tó loyva, at til vegir, ið eftir meting tess ikki fara at hava ferðslutýdning, verður avlagda breiddin sett niður í 8,0 m, av hesum til akbreyt 5,0 m.

   c. Um vegur bert gevur atgongd til í mesta lagi 4 grundir, kann byggivaldið tó loyva, at hin avlagda breiddin verður sett niður í 6,0 m.

   d. ~~Vendipláss skulu í minsta lagi verða avløgd í 12 m breidd. d.~~ Vendipláss skulu gerast sambært galdandi donskum og/ella norskum normun.

   e. ~~Gonguvegir~~ Gongubreytir skulu verða avlagdar í minst 2,0 m breidd, tó kann byggivaldið loyva, at hin avlagda breiddin verður sett niður til 1,5 m. **(Hóskar betur til verandi viðurs.)**

   f. Gøtur og gonguvegir/geilar skulu verða avlagdir í minst 2,0 m breidd. **(Hóskandi)**

   g. Tá ið serstakar umstøður tala fyri, kann verða loyvt at gera undantøk frá ásetingunum um vegabreidd. **(í serligum førum er henda áseting góð, td. á bygd)**

~~2. Í vegir, sum nevndir eru í 2. A 1.A. kann avvarðandi vegamyndugleiki krevja, at ikki má verða bundið, soleiðis at beinleiðis atgongd verður frá grannaognunum fyri akstur og gongd.~~

~~3. Áðrenn lagt verður av til nýggjan veg ella vegur, sum er, verður breiðkaður til tær í 2. stk. nevndu breiddir, skal planur í máti 1:1000 verða lagdur fyri Tekniska Stjóran, og planurin skal verða góðkendur av avvarðandi vegamyndugleika viðvíkjandi legu, leið og sambandi við áður góðkendan veg.~~

2. Vegur skal verða gjørdur samsvarandi projekti, sum býráði ~~Tekniski Stjórin~~ hevur góðkent, sambært galdandi donskum og/ella norskum normum.

3. Byggivaldið ásetir í hvønn mun og nær teir vegir, sum eitt grundstykki liggur út móti, skulu verða gjørdir.

4. Mál um bygging framvið landsvegi skulu viðgerast í samráð við Landsverk, sambært ásetingunum í lógtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 við seinni broytingum.

3. gr. Byggilinjur.

~~Sambært kortskjali 1 tilhoyrandi hesa samtykt.~~ **(Verður avloyst av GIS-kort)**
Yvirlit yvir flokking av vegnum og framtíðar vegalinjur eru skrásett *Yvirlitskort hjá Klaksvíkar kommunu*. Talan er um talgilt GIS-kort og er at finna á heimsíðu kommunurnar.

1. Byggivaldið kann viðvíkjandi bygging framvið vegnum, sum eru, vegna eina seinni breiðkan av vegnum krevja, at hon verður gjørd upp til 10 m burtur frá miðlinjuni á vegnum (+ vegskráa).

2. Tá ið byggivaldið sambært stk. 1. hevur kravt bygging flutta burtur frá vegalinju, sum er, kann økið millum hesa vegalinjuna og ta vegalinjuna, sum kemur at vera í framtíðini, verða kravd latin til breiðkan av vegnum.

3. Har hús standa nærri enn ásetta byggilinjan loyvir, kann í serligum førum frávík gevast til bygging út til facadulinju.

4. Tá ið byggivaldið sbr. 1. og. 2 hevur kravt, at byggingin verður flutt aftur frá verandi veglinju, kann verða kravt, at økið millum hesa veglinju og framtíðar veglinju verður latið til breiðkan av vegnum.

~~1.~~ **Byggilinjur framvið veg**
Byggilinja framvið vegi er at skilja soleiðis, at ikki má byggjast nærri vegin enn ásett er í pkt.~~a,b og c~~ a-

a) Ferðsluberandi vegir:
Byggilinjan er sett til 5 metrar frá bakkanti gongubreyt, og verður hendan linjan sett út frá eini vegalinjuføring, sum er góðkend av avvarandi vegamyndugleika.

b) Ferðsluvegir lagaðir til umhvørvið:
Her er talan um vegir, sum ganga útfrá miðbýnum (rundkoyringin við ~~posthúsið~~ Varpið) – Gerðagøta niðan ~~í Gerðar~~ til Kráargøtu, - Klaksvíksvegur út ~~í Búðarnar,~~ til lítlukai (heimarabryggja) - Bøgøta, - Biskupstøðgøta, Nólsoyar Pálsgøta og Stangavegur norður til Garðaveg. ~~Garðabrekka.~~
Byggilinjan er sett til 2,5 metrar frá bakkanti gongubreyt, tá hædd er tikin fyri einum møguligum komandi parkeringsslumma uppá 2,5 m.

c) Íbúðarvegir:
Byggilinjan verður her sett til 3 metrar frá gongubreyt, tó verður, har umstøðurnar loyva tí, givið loyvi til, at bilhús kunnu byggjast 1 metur frá bakkanti gongubreyt, um bygt verður soleiðis, at bilhúsið vendir við tí longru síðuni móti vegi, og at útkoyringin ikki vendir út móti vegnum.
Byggilinjan verður sett út frá eini vegalinju, sum er góðkend av avvarandi vegamyndugleika.

d) Smærri stikkvegir
Við smærri stikkvegir millum hús, har smalir atkomuvegur eru til nøkur fá hús (1 til 10 hús) verður byggilinjan sett til 2,5 metrar frá vegi.
Byggilinjan verður sett út frá eini vegalinjuføring, sum er góðkend av avvarandi vegamyndugleika

~~e) Landsvegir~~
~~Her er landsvegareglugerðin galdandi. tvs. 20 metrar frá vegmiðju – tó er 15 metra linjan galdandi omanfyri vegin við B3-økið við Borðoyarvík~~ **(LV)**

e) Breyt
Parkeringsbreyt til bussar og lastbilar er sett til 2,6 og 3,0 metrar, og millum 1,8 og 2,0 m til persónbilar. Annars sambært donskum og norksum normum.

5 . Byggilinjur annars:

a) Byggilinja móti granna er sett til 2,5 metrar fyri sethús og størri bygningar, meðan smærri bygningar, so sum úthús, bilhús v.m. kunnu byggjast í mark – við eini samlaðari longd svarandi til ásetingarnar pkt. 2, c. ~~í byggisamtyktini.~~
b) Tann aftara byggilinjan frá vegnum er sett til ~~14~~ 12 metrar frá tí fremru. ~~í nýggjum útstykkingum.~~ ~~*(broytt sambært fráboðan um góðkenning frá IMR dagf. 30.01.2012)*~~ **(12 m meria hóskandi)**
c) Galdandi fyri grundøkir við ábygdum sethúsum, plaserað nærri grannamarki enn 4 metrar: Við eini hædd uppá í mesta lagi 2,5 metrar í mun til veg kann bilhús verða bygt millum hús og vegin treytað av, at bilhúsið verður sett javnfjart við vegin, soleiðis at útkoyringin ikki verður beinleiðis út á vegin/gongubreytina. Síðan móti vegnum kann hægst verða 8 metrar. Verður bygt móti tveimum markum (nærri enn 2,5 metrar frá marki), kann samlaða longdin móti báðum markum verða hægst 12 metrar.
Er frástøðan millum húsini og bakkant veg 5 metrar ella meiri, skal byggingin ikki koma nærri bakkanti enn 1 metur.

4. gr. Ymisk loyvi til serliga nýtslu av vegnum.

~~1. Í tey øki, sum hoyra til einstaklinga og almennar vegir, kunnu, sjálvt um tey bert eru løgd av og ikki gjørd til veg, verða lagdar leiðingar og kaðlar og sett tílíkt virki, sum eftir ætlan byggivaldsins eru neyðug ella hent. Teir, sum eiga slík øki, eru skyldugir at geva atgongd til teirra í tann mun, sum neyðugt er til eftirlit og ábøtur á hesum virkjum. Tó skal, áðrenn farið verður undir arbeiðið, altíð verða gjørdur sáttmáli frammanundan viðvíkjandi møguligum endurgjaldi fyri skaðar, ið standast av hesum. Øll loyvir til at grava í veg og alt sum verður lagt í veg ella øki, ið er avlagt til veg, skulu góðkennast av Tekniska Stjóranum, áðrenn byrjað verður at grava.~~ **(BK17)**

2. Verður hildið neyðugt at flyta leiðingar, kaðlar og standarar o.a., við tað at bygging fer fram, skal hann, sum byggir, endurgjalda kommununi ella øðrum avvarðandi stovni út-

reiðslur av hesum eftir rokning. Sama er við øllum eykavegarbeiðum, ið standast av byggingini, og sum verða gjørd eftir kravi frá byggivaldinum. Um almennir stovnar so sum kommunan, ~~S.E.V. ella T.L.F.~~ el- og samskiftisveitarar selja økir, ið hesum útbúnaði, sum nevnt í 1., skal seljarin geva keyparinum upplýsingar um tær her nevndu endurgjaldsskyldur, ella gera avtalu um hvør skal gjalda.

5. gr. Hornaavskurðir og útsýnisøki.

1. Loysnir til hornaavskurðir og útsýninsøki skulu verða sambært donskum og/ella norskum normum. Um serligar umstøður eru kann býráðið loyva tillagingum og undantøkum frá hesum.
~~Tá ið grund hevur markaskil móti vegum og hesi skerast við einum horni, ið er minni enn 135°, skal hetta hornið verða skorið av við einari linju, sum ger javnstór horn við báðar veglinjurnar, og sum skal vera 3 m long í eldri býlingum og 5 m í nýggjari býlingum.~~

2. Við ~~íbinding~~ vegasamankoming ~~av vegi skulu~~ í nýggjum býlingum verða ásett útsýnisøki, har eingin lutur av bygging, lendi, girðing ella vøkstur verða hægri enn 1 m yvir hæddarstrigið á vegmiðju ~~mitt eftir vegnum~~ framman fyri útsýnisøkið.

~~3. Útsýnisøkið við teir vegir, sum nevndir eru í 2. gr. stk. 2ª verður avmarkað av linjum, sum skulu binda tvey punkt á jaðarunum á akbreytunum saman í einum fráleika ávíkavist 20 og 100 m frá skeringarpunktinum á akbreytunum, har teir 100 m verða roknaðir eftir tí týdningarmeira vegnum. Við teir vegir, sum nevndir eru í stk. 2ᵇ, verða hesir fráleikar minkaðir niður í 15 og 60 m. Við teir vegir, sum nevndir eru í stk. 2ᵉ, verða fráleikarnir ásettir av byggivaldinum. (Er hetta enn aktuelt?)~~

6. gr. Avtøka av vegum.

1. Byggivaldið kann, ~~tá ið serstøk byggisamtykt er gjørd,~~ gera av, at verandi vegir og útkoyringar verða niðurløgd ella umskipað, tá ið onnur vegatgongd verður tryggjað avvarðandi ognum.

2. Ikki er loyvt at steingja veg við bummum ella á annan hátt byrgja fyri almennari ferðslu uttan samtykki frá byggivaldinum ella løgregluni. Hetta samtykki kann verða tikið aftur.

7. gr. Girðing út móti vegi.

1. Byggivaldinum er heimilað at gera av, um grundstykki skal verða girt móti vegi, sum liggur framvið, ella um markið millum grund og veg skal verða greitt á annan hátt. ~~Av hvørjum slag og hvussu høg girðingin skal vera, ger byggivaldið av, og farið verður eftir, hvat grundin er nýtt til.~~

2. Tá ið ræður um ídnaðarbygging, goymslupláss og tílíkt, kann byggivaldið krevja, at girðingin verður sett nóg høgt móti grannaogn.

3. Um garður ella bakkantur millum veg og grund (húsaogn, bygning, parkeringsøki o.a.) verður tikin burtur, skal ein avmerking gerast ístaðin (t.d. brúgvasteinar), fyri greitt at sýna markið millum veg og grund ella líknandi.

4. Bert ein innkoyring verður gjørd inn á hvørja sethúsaogn/stakhús grundogn. Breiddin á innkloyrin er í mesta lagi 5 metrar, og 7,5 metrar, har krav er um 3 parkeringspláss. Byggivaldið kann gera av breiddin á inn- og útkoyring, vísandi til nýtsluna av ognini.

VI. KAPITTUL. ALMENNAR ÁSETINGAR UM HÚSABYGGING.

1. gr. Ásetingar um húsabygging.

1. Tá ið farið verður undir byggiarbeiði, heruppií niðurtøku, spreinging og grevstur fyri grund, skal verða tikið til øll trygdarráð, ið neyðug eru til tess at tryggja annnan mans persón og ogn.

2. Byggiplássið skal í øllum lutum verða væl skipað og hildið í nóg góðum standi og innkoyring til byggiplássið og akbreyt á tí skulu verða styrkt á fullgóðan hátt og hildin í nóg góðum standi.

3. Vegur og gongubreyt mugu ikki verða skadd ella dálkað, tá mold, tilfar ella rusk verður koyrt til ella frá, og skulu verða sett í sama stand aftur, har tað er neyðugt.

4 Vegøki mugu ikki uttan serstakt loyvi verða nýtt til byggipláss ella til goymslu av tilfari.

Bygging í D-økjum, fríøkjum.

a) Í serligum føri kann býráðið geva loyvi at byggja og skipa t.d. tøknihús, trafostød, parkeringsøki í fríøkjum.

b) Loyvt er at umvæla verandi bygningar og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu.

Útstykking

1. Tá útstykkingar verða gjørdar, skal umframt øki til vegir, parkering, reinsiverk o.l., skal hóskandi øki uppá í minsta lagi 10% av samlaðu víddini verða lagt til felagsøki, herundir spælipláss.

2 . Í samband við útstykkingar í A-økispørtum. Fyri stakhús og samanbygd hús kann ein partur av grundsøkjavíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m^2 fyri hvørt grundstykki.
Felagslendi: fríøki, spælipláss, felags parkeringsøki o.tíl. Veglendi verður ikki at roknað sum felagslendi

3. Tá útstykkingar verða gjørdar, skulu umframt krøv frá bygningkunngerðini, skulu 0,5 parkeringpláss pr. búeind gerast á felags parkeringplássið til almenna nýtslu.

2. gr. Krøv til byggingar (BK17)

~~1. Øll bygging skal vera úr góðum tilfari, sum er haldgott og væl nýtiligt til endamálið og nóg gott tekniskt eins og handverksliga.~~

~~2. Alt, sum neyðugt er vegna veður, eigur at verða gjørt til tess at tryggja fullgott arbeiði.~~

~~3. Hvørt hús skal verða innrættað á hóskandi hátt og tryggiliga, og hesum viðvíkjandi í minsta lagi lúka tey krøv, sum tilskilað eru í VII. kapitli í byggisamtyktini.~~

~~4. Hvørt hús ella partur av húsi skulu, hvat ið málum og konstruktión viðvíkur, verða soleiðis tilevnað, at vissa er fyri nóg góðari styrki og stoðufesti. Hús skulu tí viðvíkjandi í minsta lagi lúka treytirnar í VIII. kapitli í samtyktini ella tað skal verða sannað við útrokningum ella á annan hátt, at tryggjað er nóg góð styrki ella stoðufesti.~~

~~5. Øll hús skulu verða gjørd og innrættað á slíkan hátt og úr slíkum tilfari, at tey geva fólki, ið inni eru, nóg góða trygd fyri eldsbruna og trygd fyri, at eldurin ikki festir í hús og virki á grannagrundunum. Hús skulu tí viðvíkjandi í minsta lagi lúka treytirnar í IX. kapitli í samtyktini.~~

~~6. Hús skulu verða avbyrgd væl og virðiliga móti slavi, kulda og ljóði og tí viðvíkjandi í minsta lagi lúka treytirnar í X. kapitli í samtyktini.~~

~~7. Húsum skulu verða tryggjaðir nóg góðir hitingar- og luftnýggjanarmøguleikar, og tey skulu tí viðvíkjandi í minsta lagi lúka treytirnar í XI. og XII. kapitli í samtyktini.~~

~~8. Útsíðan á bygningunum skal verða gjørd úr slíkum tilfari og verða viðgjørd soleiðis, at teir samsvara væl við bygging har í nánd. Somuleiðis skulu bygningarnir viðvíkjandi skapi og útsjónd verða soleiðis háttaðir, at teir samtykkja væl við landslagið.~~

~~VII. KAPITTUL. ÁSETINGAR UM INNRÆTTING AV EINHÚSKISHÚSUM.~~ (BK17)

~~1. gr. Økið, sum ásetingarnar hava gildi fyri.~~

~~Ásetingarnar í hesum kapitli og VIII, IX, X, XI og XII kapitlum hava gildi fyri hús til eitt húski, sum standa fyri seg, við bruttohæddavídd í mesta lagi 400 m^2.~~

~~2. gr. Búrúm.~~ (BK17)

1. ~~Sum búrúm eru at skilja tilhaldsrúm, sovikømur og tílík rúm, ið eru ætlað til varandi tilhald á degi ella nátt.~~

2. ~~Búrúm skulu hava eina gólvvídd, ið ikki er minni enn 5,0 m^2 og eitt rúmmál, sum er minst 12,0 m^3.~~

3. ~~Búrúm skulu vanliga vera í minsta lagi 2,4 m høg. Í serligum førum kann hæddin tó verða lækkað til 2,3 m, treytað av, at rúmmálið í minsta lagi er 12 m^3. Í búrúmum við skráum veggjum skal miðalhæddin á rúminum vera 2,4 m. Tó geldur fyri rúm í nýttum loftshæddum, at hæddin í minsta lagi skal vera 2,3 m í miðal.~~

4. ~~Í búrúmum má gólvið vanliga ikki liggja undir lendinum uttanum. Um lendisviðurskiftini eru óvanlig, kann verða loyvt, at bert gólvið undir vindeygavegginum skal liggja hægri enn lendið uttanum.~~

5. ~~Vindeygavíddin í búrúmi skal vera minst 10% av gólvvíddini í rúminum.~~

~~3. gr. Køkar.~~ (BK17)

1. ~~Køkar skulu viðvíkjandi gólvvíd, rúmvídd, hædd, legu og ljósviðurskiftum lúka treytirnar í 2. gr.~~

2. ~~Køkur skal hava køksborð við arbeiðsplássi og vaski, goymslustað til køksbúnyttur, borðbúnað o.t. og kókipláss. Framman fyri køksborðið skal vera frítt rúm, sum er í minsta lagi 90 cm til breiddar.~~

~~4. gr. Wc- og baðirúm.~~ (BK17)

1. ~~Í wc-rúmum skal gólvvíddin vera minst 1 m^2, og í baðirúmum við wc skal gólvvíddin vera minst 2 m^2.~~

~~5. gr. Arbeiðsrúm.~~ (BK17)

1. ~~Ásetingarnar um innrætting av búrúmum galda eisini innrætting av arbeiðisrúmum, uttan so at byggivaldið góðkennir frávik frá hesum.~~

2. Loyvi at innrætta arbeiðisrúm við gólvi, ið liggur lægri enn lendið, kann bert verða givið, um rúmið við avveiting ella á annan nóg góðan hátt er vart fyri slevju frá grundini.

6. gr. Rúm til rúskíløt og tílíkt. (BK17)

1. Til at goyma rusk í fyribils skal vera pláss ella rúm, ið til stødd og innrætting skal lúka tey krøv, ið byggivaldið setir.

7. gr. Vanlig krøv viðvíkjandi innrætting av íbúðum. (BK17)

1. Íbúð skal umframt køk og wc hava minst eitt búrúm.

2. Í hvørjari íbúð skal í minsta lagi eitt búrúm venda soleiðis, at tað fær nóg nógva sól.

8. gr. Atgongdar- og trappuviðurskifti v.m. (BK17)

1. Útgongd skal verða gjørd soleiðis og altíð vera í slíkum standi, at tað slepst um hana í allari víddini, ótálmað og uttan vanda.

2. Trappur, forsdyr og tílíkar atgongdir skulu verða gjørdar soleiðis, at tær lúka hesi krøv:

   a. Í húsum við búrúmum, ið eru í 2 hæddum skal hin fría breiddin á trappum millum hæddirnar vera minst 80 cm og hin fría breiddin á møguligari kjallaratrappu minst 70 cm.

   b. Forrúm frá trappurúmi og út skulu vera minst 1,2 m í fríari breidd, og hæddin skal vera minst 2,2 m.

   c. Trappur skulu hava eina opna hædd yvir forkanti á trappu og trappupøllum minst 2 m mált í gongulinjuni.

   d. Innanhýsis trappur skulu verða gjørdar við hægst 21 cm stigi og ikki minni grund enn 21 cm. Frítt op millum stig í trappum skal ikki vera hægri enn 12 cm.

   e. Allar trappur skulu á teimum opnu síðunum hava haldgott rimaverk, ið er minst 80 cm høgt, mált frá trappuframsíðuni í trappupørtunum, og minst 90 cm høgt við trappupallarnar. Loddrøtt op í rimaverkinum mugu ikki vera meiri enn 12 cm breið. Vatnrøtt op skulu verða soleiðis tilevnað, at børn eru tryggiliga vard. Framman fyri vindeyga ella annað op, sum ikki er í minsta lagi 80 cm oman fyri trappur ella trappu-pallar skal verða sett rimaverk ella onnur álítandi verja.

   f. Uttandura trappur til høvuðsdyr skulu hava minst 28 cm grund og aðrar uttandura trappur minst 25 cm grund. Trappustig mugu ikki vera hægri enn 18 cm.

g. Uttandura trappur til høvuðsdyr skulu hava fría breidd minst 1,0 m.

h. Uttandura trappur skulu í neyðugan mun verða útgjørdar við rimaverki. Kjallaratrappur uttan skulu verða útgjørdar við handlista í aðrari síðuni.

i. Viðvíkjandi trappum, ið eru ólíkar teimum, ið nevndar eru omanfyri, kann byggivaldið í hvørjum einstøkum føri herða ella linka krøvini.

3. Svalar og gluggadyr skulu hava rimaverk, ið er minst 1 m høgt. Loddrøtt op mugu ikki vera meiri enn 12 cm breið, og vatnrøtt op skulu verða soleiðis gjørd, at børn eru tryggiliga vard.

VIII. KAPITTUL. ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI KONSTRUKTIÓN AV EINHÚSKISHÚSUM. (BK17)

1. gr. Ikki berandi skilaveggir. (BK17)

1. Vanliga verða ikki sett serstøk krøv viðvíkjandi konstruktión av ikki berandi skilaveggjum.

2. gr. Skilagólv. (BK17)

1. Útrokningin eins og konstruktiónin skulu verða góðkend av byggivaldinum.

3. gr. Gólv. (BK17)

1. Gólv skulu bæði viðvíkjandi dimensjón og gerð verða góðkend av byggivaldinum.

4. gr. Tak. (BK17)

1. Takkvistar, omanljós, takvindeygu og onnur op í takflatanum kunnu verða sett í tann mun tað samtykkir við støðufestið í takkonstruktiónini.

~~2. Øll tak og takrúm skulu verða atkomandi til eftirlit og umvæling. Tá ið ikki er atkomandi á annan hátt til takrúmið, skal lemmur við stiga vera í trappurúmi.~~

~~3. Dimensjónir á yvirtromum eins og gerðin annars skulu verða góðkend av byggivaldinum.~~

~~5. gr. Tekjan.~~ (BK17)

~~1. Byggivaldið skal góðkenna dimensjón og gerð.~~

~~2. Tak skulu hava takrennur og rennustokkar ella frárenning innan, og tekjan skal halla oman ímóti hesum rennum.~~

6. gr. Takkvistar og omanljós.

1. Takkvistar, omanljós, takvindeygu og onnur op í takflatanum kunnu verða sett í tann mun, tey ikki eru til vansa fyri støðufesti í yvirtromini.

2. Øll kvistbreiddin, máld har framsíðan kemur saman við takið, má ikki verða størri enn hálv longdin á tí taksíðu, har kvistarnir verða settir.

~~7. gr. Aðrar konstruktiónir.~~ (BK17)

~~Aðrar konstruktiónir enn tær í hesum kapitli nevndu skulu góðkennast av byggivaldinum.~~

~~IX. KAPITTUL. ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI ELDVERJU Í EINHÚSKISHÚSUM.~~ (BK17)

~~KUNNGERÐ UM BRUNAVERJU OG BRUNATRYGD »Kunngerðarblaðið A«, hefti 14, 1999, hefti 14. nr. 45 frá 9. mai 1992 við broytingum í Kunngerð nr. 88 frá 9. november 1999 verður galdandi framyvir.~~

~~X. KAPITTUL. ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI SLAVI OG HITA Í EINHÚSKISHÚSUM.~~ (BK17)

~~1. gr. Kjallaragólv.~~ (BK17)

~~1. Kjallaragólv skulu verða vard fyri tvørligum slavi frá grundini við burturveiting og við hóskandi avbyrging.~~

~~2. Gólv í grulvikjallara og øðrum skotum við skilagólvi úr viði omaná skulu við burturveiting verða vard fyri, at vatn seyrar inn.~~

~~2. gr. Kjallaraveggur.~~ (BK17)

~~1. Útveggir skulu, har ið teir venda móti jørð, verða vardir fyri slavi við burturveiting~~

~~2. Útveggir og skilaveggir í kjallara skulu verða vardir fyri slavi úr grundini á tann hátt, at lagt verður tætt avbyrgingarlag millum undirstøði og vegg.~~

~~3. gr. Útveggir.~~ (BK17)

~~1. Útveggir skulu verða vardir fyri slavi úr grundini eitt nú soleiðis, at lagt verður tætt avbyrgingarlag o.u. 15 cm oman fyri jørðildi. Eru kjallaraútveggir ella undirstøði úr betongi gjørd eins høgt oman fyri jørðildi, verður avbyrgingarlagið lagt á hesi. Um niðasta skilagólv liggur lægri enn avbyrgingarlagið, skulu serlig tiltøk verða gjørd til avbyrging av skilagólvinum. Avbyrging fyri slavi millum vegg og undirstøði skal verða gjørt soleiðis, at regn, ið setur inn, verður veitt burtur.~~

~~2. Útveggir, ið avmarka búrúm, køkar og eykarúm, skulu verða avbyrgdir fyri kulda. K-virkið á tungum útveggjum má ikki fara upp um 0,40, og snýr tað seg um lættan útvegg, ikki upp um 0,30.~~

~~3. Vindeygu (undantikin smærri luftnýggjanarop), veggjapartar úr glasi og hurðar í útveggjum skulu verja móti kulda. Til dømis skulu glasflatir, sum eru minni enn 60% av víddini á útveggjunum verða gjørdar úr 2 glasløgum við í minsta lagi 6 mm ímillum (svarandi til eitt flutningstal, ið er minni enn 3,30).~~

~~4. Allar konstruktiónir skulu verða gjørdar á slíkan hátt, at sloppið verður undan slevju bæði innan og uttan í konstruktiónunum.~~

~~4. gr. Skilarúm.~~ (BK17)

1. ~~Skilarúm í stovuhædd, ið hava sjálvstøðugt undirstøði, skulu verða avbyrgd fyri jarðarslevju eins og skilarúm í kjallara, sbr. ásetingina í 2. gr., 2. stk.~~

2. ~~Veggir uttan um baðirúm og wc-rúm við gólvfrárenning skulu verða gjørdir soleiðis, at slevja ella vatn ikki legst í konstruktiónirnar.~~

3. ~~Skilarúm, ið avmarka búrúm, køkar og eykarúm móti køldum rúmum skulu verða avbyrgd fyri kulda~~

~~5. gr. Skilagólv.~~ (BK17)

1. ~~Har skilagólv verða gjørd sum bjálkaløg úr viði, skulu bjálkaendar á betongi verða vardir móti roti.~~
2. ~~Grulvikjallara skal hesin verða luftaður til at tryggja móti slavi.~~

   ~~Undir skilagólvum úr viði skulu tískil í tveimum útveggjum, ið standa hvør yvir av øðrum, verða gjørd luftingarop við hægst 4 metrum ímillum og í mesta lagi 1 m frá húsahorni. Luftingaropini skulu hvørt vera minst 150 cm^2 víð. Opini skulu hava ristir ella tílíkt, sum ikki kunnu verða lokaðar. Í skilarúmunum í skotunum skulu vera op, ið svara til opini í útveggjunum. Undir skilagólvum úr betongi og tílíkum kann talið á luftingaropum fara niður í helvt.~~

3. ~~Skilagólv undir baði- og vaskirúmum, wc-rúmum við gólvfrárenning og øðrum rúmum, ið javnan eru fyri slavi, skulu verða gjørd úr tilfari, sum hvørki vatn ella slav rínur við.~~

4. ~~Skilagólv, ið avmarka búrúm, køkar og eykarúm móti køldum rúmum, yvir luftaðum grulvikjallaraum og móti serliga heitum rúm (ketilrúmum, bakirúmum o.s.fr.) skulu verða avbyrgd.~~

   ~~Skilagólv yvir opnum rúmum (rúm innan fyri portur, opin bilskúr e.t.l.) skulu verða avbyrgd.~~

~~6. gr. Gólv.~~ (BK17)

1. ~~Gólv beinleiðis á jørðildi kunnu verða gjørd úr betongi. Botnurin skal vera fastur og turrur. Betonggólvið verður tryggjað fyri jarðarslavi við einum burturveitingarlagi, ið ikki sýgur slav til sín, og sum er úr ólívrunnum evni. Har viðurskiftini gera tað neyðugt, skal burturveitingarlagið verða gjørt soleiðis, at vatn kann seta frá, og lagt skal verða vatnforðandi lag millum burturveitingarlag og betonggólv.~~

2. ~~Gólv á jørðildi skulu verða avbyrgd fyri kulda~~

3. ~~Gólv í wc-rúmum, baðirúmum, vaskirúmum og øðum rúmum, ið javnan eru fyri slavi, skulu verða løgd við vatntøttum og slevjutryggum tilfari.~~

~~7. gr. Tak.~~ (BK17)

~~1. Lofts- og takkonstruktiónir, ið avmarka hitað rúm, skulu verða avbyrgd fyri kulda.~~

~~2. Til tess at sleppa undan slevju skal verða lagt millum takkonstruktiónir úr viði og hitað rúm eitt guvutætt lag á innaru síðuni av avbyrgingini.~~

~~Takkonstruktiónin skal annars verða luftað millum tekju og avbyrging við luftnýggjanaropum við samlaðari nettvídd, ið ikki er minni enn 1/800 av tí takta økinum og javnt býtt fram eftir takinum.~~

~~XI. KAPITTUL. ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI LUFTNÝGGJAN Í EINHÚSKISHÚSUM.~~ (BK17)

~~1. gr. Almenn krøv.~~ (BK17)

~~1. Í einhúskishúsum skulu tey einstøku rúmini fáa nóg mikið av frískari luft og hava tað náttúrliga ella mekanisku luftnýggjan, ið er neyðug í mun til stødd og nýtslu.~~

~~2. gr. Búrúm.~~ (BK17)

~~1. Búrúmum skal verða tryggjað frísk luft við vindeyga, ið kann verða latið upp, ella úthurð, ella ventilar.~~

~~3. gr. Køkar.~~ (BK17)

~~1. Í køkum verður luftnýggjan tryggjað við vindeyga, ið kann verða latið upp og stikkað (ella lemmi) ella úthurðum. Frísk luft kann eisini verða tryggjað við einum ventili í útveggi; hitt fría opið skal vera minst 30 cm^2.~~

~~4. gr. Wc- og baðirúm.~~ (BK17)

~~1. Í wc- og baðirúmum skal frísk luft verða tryggjað við vindeyga, ið kann verða latið upp og sum er minst 0,2 m^2 ella við ventili, har opið er minst 100 cm^2.~~
~~Frísk luft kann eisini verða tryggjað við luftnýggjanarrás .~~
~~2. Wc- og baðirúm skulu umframt verða luftað á sama hátt sum køkar, samanber 3. gr., 2. stk~~.

~~5. gr. Vaski og turkirúm.~~ (BK17)

~~1. Í vaski- og turkirúmum skal frísk luft verða tryggjað við vindeyga at lata upp ella ventilar.~~

~~2. Vaski- og turkirúm skulu harumframt verða luftað á sama hátt sum køkar, samanber 3. gr., 2. stk.~~

~~XII. KAPITTUL. HITAAVBYRGINGAREVNI FYRI HÚSALUTIR.~~ (BK17)

~~1. gr. Almennt.~~ (BK17)

~~1. Hitaavbyrgingarevnið hjá húsaluti verður tilskilað við flutningstalinum K mált í W/m²°C.~~

~~2. Húsalutir, ið skulu verða hitaavbyrgdir samsvarandi krøvunum sum nevnd eru niðanfyri, skulu bert hava kuldabrýr í minni mun og skulu verða gjørdir soleiðis, at hitamissurin ikki verður munandi øktur vegna vind og slevju. Er hitaavbyrgingin fyri serliga nógvari ávirkan av vindi, skal hon verða klødd við vindtættum tilfari.~~

~~3. Tær í fylgjandi greinum tilskilaðu konstruktiónir kunnu vanliga verða roknaðar at lúka tey tilskilaðu K-virðini.~~

~~2. gr. Útveggir við vekt undir 100 kg/m² – k max. 0,30.~~

~~3. gr. Útveggir við vekt yvir 100 kg/m² – max. 0,40.~~

~~4. gr. Skilaveggir móti ikki-hitaðum rúmi – k max. 0,50.~~

~~5. gr. Gólv og skilagólv beinleiðis á jørðildi ella úteftir – k max. 0,40.~~

~~6. gr. Gólv og skilagólv móti ikki-hitaðum rúmum – k max. 0,60.~~

~~7. gr. Lofts- og takkonsttuktiónir, ið avmarka hitað rúm – k max. 0,20.~~

~~**8. gr. Vindeygu, ið eru minni enn 60% av víddini á útvegginum – k max. 2,90.**~~

~~**9. gr. Vindeygu, ið eru størri enn 60% av víddini á útvegginum – k max. 3,30.**~~

~~XIII. KAPITTUL. ONNUR VIÐURSKIFTI VIÐVÍKJANDI BYGGING.~~ (BK17)

~~1. gr. Ljóðviðurskifti.~~ (BK17)

~~1. Byggivaldið fyriskipar, tá ið og har viðurskiftini gera tað neyðugt, gjøllaru ásetingar viðvíkjandi ljóðviðurskiftum.~~

~~2. gr. Innleggingar.~~ (BK17)

~~1. Byggivaldið fyriskipar, tá ið og har viðurskiftini gera tað neyðugt, gjøllaru ásetingar viðvíkjandi innleggingum av øllum slagi.~~

XIV. KAPITTUL. ÚTGANGUR.

1. gr. Broytingar í byggisamtyktini.

1. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir býráðssamtykt og við góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

~~Soleiðis samtykt av Klaksvíkar Býráð eftir samráðing við Landsstýrið.~~

~~Klaksvík, hin~~

~~Steinbjørn O. Jacobsen~~ ~~Heri M. Hammer~~
~~borgarstjóri~~ ~~býarverkfrøðingur~~

~~Sambært 4. gr., 1. stk., í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður frammanfyri standandi uppskot til byggisamtykt fyri Klaksvíkar Kommunu góðkent.~~ **(Óneyðugt)**

Føroya Landsstýri, hin

~~Innihaldsyvirlit~~ (Nýtt hóskandi innihaldsyvirlit verður gjørt)

~~I. KAPITTUL. UMSITINGARLIGAR FYRISKIPANIR. 2~~
~~1. gr. Byggivaldið. 2~~
~~2. gr. Økið, sum byggisamtyktin hevur gildi fyri. 2~~
~~3. gr. Byggifulltrúin 3~~
~~Byggifulltrúin: 3~~
~~4. gr. Byggiumsóknir. 4~~
~~5. gr. Byggiloyvi og byggiváttan. 6~~
~~6. gr. Umsiting og niðurtøka av bygging. 7~~
~~7. gr. Trygdartiltøk, meðan bygt verður. 7~~
~~8. gr. Brot á fyriskipanirnar í byggisamtyktini, atgonguheimild og trygging av ásetingunum. 7~~
~~9. gr. Undantaksloyvi. 9~~
~~10. gr. Kæra. 9~~
~~11. gr. Reglur um gjøld. 9~~
~~Gjald fyri byggiváttan 9~~
~~II. KAPITTUL. FRÁRENNING OG VATNVEITING. 10~~
~~1. gr. Frárenning: 10~~
~~2. gr. Broytingar í frárenningum, sum eru. 11~~
~~3. gr. Vatnveiting. 11~~
~~III. KAPITTUL. ÓBYGDU ØKINI. 11~~
~~1. gr. Tilhaldspláss. 11~~
~~2. gr. Gerð og umsiting av tilhaldsplássum. 12~~
~~3. gr. Øki til bilstøðlar. 12~~
~~4. gr. Atgongd frá vegi til óbygd øki. 12~~
~~IV. KAPITTUL. BYGGIFYRISKIPANDI ÁSETINGAR. 13~~
~~1. gr. Orðaskiljingar. Útrokning av nýtingarstigum o.a.m. 13~~
~~2. gr. Byggingarhædd og fráleikar 13~~
~~V. KAPITTUL. VEGIR. 14~~
~~1. gr. Orðaskiljingar. 14~~
~~2. gr. Um at leggja av til og gera vegir. 15~~
~~3. gr. Byggilinjur. 16~~
~~4. gr. Ymisk loyvi til serliga nýtslu av vegnum. 17~~
~~5. gr. Hornaavskurðir og útsýnisøki. 18~~
~~6. gr. Avtøka av vegum. 18~~
~~7. gr. Girðing út móti vegi. 18~~
~~VI. KAPITTUL. ALMENNAR ÁSETINGAR UM HÚSABYGGING. 19~~
~~1. gr. Ásetingar um húsabygging 19~~
~~2. gr. Krøv til byggingar. 20~~
~~VII. KAPITTUL. ÁSETINGAR UM INNRÆTTING AV EINHÚSKISHÚSUM. 20~~
~~1. gr. Økið, sum ásetingarnar hava gildi fyri. 21~~
~~2. gr. Búrúm. 21~~
~~3. gr. Køkar. 21~~
~~4. gr. Wc- og baðirúm. 21~~
~~5. gr. Arbeiðsrúm. 21~~

~~6. gr. Rúm til rúskíløt og tílíkt. 22~~
~~7. gr. Vanlig krøv viðvíkjandi innrætting av íbúðum. 22~~
~~8. gr. Atgongdar- og trappuviðurskifti v.m. 22~~
~~VIII. KAPITTUL. 23~~
~~ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI KONSTRUKTIÓN AV EINHÚSKISHÚSUM. 23~~
~~1. gr. Ikki berandi skilaveggir. 23~~
~~2. gr. Skilagólv. 23~~
~~3. gr. Gólv. 23~~
~~4. gr. Tak. 23~~
~~5. gr. Tekjan. 24~~
~~6. gr. Takkvistar og omanljós. 24~~
~~7. gr. Aðrar konstruktiónir. 24~~
~~IX. KAPITTUL. 24~~
~~ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI ELDVERJU Í EINHÚSKISHÚSUM. 24~~
~~X. KAPITTUL. 25~~
~~ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI SLAVI OG HITA Í EINHÚSKISHÚSUM. 25~~
~~1. gr. Kjallaragólv. 25~~
~~2. gr. Kjallaraveggur. 25~~
~~3. gr. Útveggir. 25~~
~~4. gr. Skilarúm. 25~~
~~5. gr. Skilagólv. 26~~
~~6. gr. Gólv. 26~~
~~7. gr. Tak. 27~~
~~XI. KAPITTUL. 27~~
~~ÁSETINGAR VIÐVÍKJANDI LUFTNÝGGJAN Í EINHÚSKISHÚSUM. 27~~
~~1. gr. Almenn krøv. 27~~
~~2. gr. Búrúm. 27~~
~~3. gr. Køkar. 27~~
~~4. gr. Wc- og baðirúm. 27~~
~~5. gr. Vaski og turkirúm. 28~~
~~XII. KAPITTUL. HITAAVBYRGINGAREVNI FYRI HÚSALUTIR. 28~~
~~1. gr. Alment. 28~~
~~XIII. KAPITTUL. ONNUR VIÐURSKIFTI VIÐVÍKJANDI BYGGING. 29~~
~~1. gr. Ljóðviðurskifti. 29~~
~~2. gr. Innleggingar. 29~~
~~XIV. KAPITTUL. ÚTGANGUR. 29~~
~~1. gr. Broytingar í byggisamtyktini. 29~~